UTTAN ÚR HEIMI

## Valið ávirkar oljuprísin

Teir seinastu dagarnar er oljuprísurin hækkaður munandi, og tað kemst millum annað av úrslitinum av forsetavalinum í Iran.

Serkøn á altjóða oljumarknaðinum rokna við, at tann nývaldi, konservativi forsetin, Mahmoud Ahmasinejad, fer at geva iranskum oljufeløgum fyrimunir fram um tey útlendsku á iranska marknaðinum. Nývaldi forsetin hevur ikki nevnt nakað um slíkar ætlanir, men eygleiðarar siga, at hansara politisku hugsjónir benda á, at hann fer at taka onkur tílík stig.

Tað er kortini ikki bara iranska forsetavalið, sum fær oljuprísin at hækka. Ein onnur orsøk er ein ávísur ótti fyri, at ov lítil olja verður á marknaðinum, tá veturin kemur, og harafturat stendur tað á hjá reinsiverkunum at fylgja við eftirspurninginum, skrivar Reuters.

## Ger sær dælt av Irak

Maðurin, sum stendur á odda fyri keypsdeildini hjá amerikanska herinum, vil vera við, at fyritøkan Halliburton hevur gjørt sær dælt av teimum sáttmálum, sum fyritøkan hevur fingið í sambandi við arbeiðið at endurbyggja Irak.

Bunny Greenhouse hevur verið innkeypsstjóri hjá amerikanska herinum í tjúgu ár, og hann sigur seg ongantíð hava upplivað, at ein fyritøka hevur misbrúkt sínar sáttmálar so nógv, sum Halliburton hevur gjørt í Irak. Hann hevur ikki nevnt nakað tal, men grannskoðanin hjá amerikanska verjumálaráðnum hevur illgruna um, at Halliburton hevur fingið einar seks milliardir krónur ov nógv fyri arbeiðið, sum fyritøkan hevur gjørt í Irak.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at Halliburton er fyri slíkum atfinningum. Áhugin fyri virkseminum hjá felagnum er serliga stórur, tí varaforsetin, Dick Cheney, var stjóri í felagnum, áðrenn hann gjørdist varaforseti.

## Nýta vindorku í Bretlandi

Norska fyritøkan Hydro keypti mánadagin helmingin av bretska vindmyllufelagnum Scira, og gongst eftir ætlan, fer norska fyritøkan at keypa 45 prosent av partabrøvunum afturat um stutta tíð.

Scira hevur fingið heimild til at seta 100 vindmyllur upp á 20 metra dýpi uttan fyri ensku eysturstrondina. Verkætlanin er mett at kosta góðar 2,2 milliardir krónur, og ætlandi skal tann seinasta myllan setast upp um fimm ár. Tær 100 vindmyllurnar skulu veita 175.000 húsarhaldum í Norfolk streym, og ætlanin er, at framleiðslan frá kolorkuverkum skal skerjast tilsvarandi.

Bretska stjórnin hevur økt stuðulin til varandi orku munandi, og leiðslan í Hydro dylur ikki fyri, at uttan stuðulin hevur verkætlanin í Norfolk ikki verið lønandi.

## Fekk bót

Fyrr í ár gjørdu danskir fjølmiðlar nógv burturúr, at bóndin Jørgen Tørnæs hevði havt tveir letlendingar og ein ukraina í arbeiði á garðinum, sjálvt um teirra arbeiðs- og uppihaldsloyvi vóru farin úr gildi.

Teir seinastu mánaðarnar hevur løgreglan í Holstebro kannað málið, og í dag fær Jørgen Tørnæs at vita, at hann skal gjalda 143.000 krónur í bót fyri lógarbrotið. Í gjár segði hann, at hann heldur bótina vera órímiliga, men at hann kortini hevur gjørt av at gjalda hana.

Jørgen Tørnæs er kanska ikki tann einasti danski bóndin, sum hevur brúkt ólógliga arbeiðsmegi. Men hansara mál vakti serligan ans, tí hann er giftur við menningarmálaráðharranum, Ullu Tørnæs, og tað vóru eisini tey, sum vildu vera við, at hon hevði verið vitandi um tey ólógligu viðurskiftini. Men tað avsannaði hon, og tí fekk málið ongar politiskar avleiðingar fyri hana.

# Fólk í túsundatali flýggja undan Mugabe



*Ein seks ára gomul zimbabwisk smágenta uttan fyri tað, sum eina ferð var hennara heim*

**Tey heimleysu, tey arbeiðsleysu og tey vónleysu í Zimbabwe flýggja undan einaræðisstýrinum hjá forsetanum**

ZIMBABWE
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Seinastu dagarnar eru fólk í túsundatali rýmd úr Zimbabwe til Suðurafrika. Tey flestu eru vorðin heimleys, tí at forsetin, Robert Mugabe, hevur givið herinum boð um at ríva hús teirra niður. Í fleiri førum hava hermenninir sett eld á húsatoftirnar, og somu lagnu fáa tey smáu virkini, sum fólk eiga.

- Hetta hevur verið ein ræðulig tíð, og fleiri ferðir havi eg hugsað um deyðan sum ta einastu loysnina, sigur Ruth Chipembere við Aftenposten. Hon, maðurin og børnini eru millum teira, sum eru vorðin heimleys, og sum kendu seg noydd at flýggja av landinum.

Tann seinasta mánaðin hava zimbabwisku myndugleikarnir skipað fyri einum sokallaðum "reinsingarátaki" í høvuðsstaðnum Harare. Útlendskir eygleiðarar siga, at átakið er einki annað enn eitt beinleiðis álop á tað fátæka fólkið. Nógv hús og arbeiðspláss eru javnað við jørðina, og fleiri hundraðtúsund eru vorðin heimleys. Oyðileggingarnar eru so umfatandi, at summi sammeta stýrið hjá Robert Mugabe, forseta við tað gamla apartheidstýrið í Suðurafrika, sum flutti fólk burtur, sama um tað var lógligt ella ikki.

- Tað er syndarligt at síggja, hvat hendir í Zimbabwe í dag, tí tað er tað sama, sum hendi í teimum ringastu døgunum hjá apartheid-stýrinum, sigur Elinor Sisulu, sum er formaður í einum hjálparfelagsskapi í Suðurafrika.

Maður Ruth Chipembere, Faber, hevur verið virkin í zimbabwisku andstøðuni í fleiri ár, men tað hevur hann eisini fingið at kenna. Fyri tveimum árum síðani tóku nakrir stjórnarhermenn konu hansara og bukaðu og neyðtóku hana fleiri ferðir, meðan fólk stóðu og hugdu at.

Í dag kunnu tey kenna seg trygg í Suðurafrika. Tey eru ikki tey einastui, tí tey seinastu árini eru umleið tríggjar milliónir fólk flýdd úr Zimbabwe undan einaræðinum hjá Robert Mugabe.

# Krevur neyðtøkumenn dømdar til deyða

**Tann 36 ára gamla pakistanska kvinnan Mukhtar Mai krevur, at menninir, sum neyðtóku hana, verða dømdir til deyða. Málið er nú í hægstarætti**

PAKISTAN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ovasta ráðið í teirri lítlu pakistansku bygdini gjørdi av, at fýra menn skuldu neyðtaka Mukhtar Mai, tí tólv ára gamli beiggi hennara hevði verið ov nær einari kvinnu, sum var av einari av teimum betru ættunum.

Hetta hendi í 2002. Revsingin er rættiliga vanlig í pørtum av Pakistan, men Mukhtar Mai er ikki sum aðrar pakistanskar kvinnur. Hon setti seg upp ímóti samfelagnum og meldaði neyðtøkumenninar til løgregluna. Seinni sama ár vórðu seks menn dømdir fyri neyðtøku og fyri at hava medvirkað til neyðtøku, men í mars í ár fríkendi ein átrúnaðarligur dómstólur fimm av teimum dømdu.

Men Mukhtar Mai gavst ikki. Hon kærdi úrskurðin, og nú skal hægstirættur taka støðu til málið. Hon og sakførari hennara eru ikki í iva um, hvørja revsing neyðtøkumenninir skulu hava.

- Ber tað til at fyrigeva slíkum? Eg fái meg í hvussu er ikki til at gera tað, segði hon við útlendsk tíðindafólk, tá viðgerðin í hægstarætti byrjaði mánadagin.